sosialurin telf. 11820, box 76, 3800 Tórshavn
Útgevari: Føroya Javnaðarflokkur
Blaðstjórn: Vilhelm Johannesen (ábyrgd), telf. 56111
Johnsigurd Johannesen, telf. 13242
Prent: Prentsmiðjan á Heygsbreyt

Grundleggjandi skeivleikin

TIL PRÓVTØKUNA seinasta ár gjørdu næmingar við studentaskúlan í Hoydølum vart við seg í málspurninginum, har støðan tá var tann, at í summum lærugreinum skuldi prøvtøkan eins og árini framman undan fara fram á donskum, tá prøvdómarar ikki fingust, sum skiltu føroyskt mál.

ÚRSLITIÐ AV ósemjuni seinasta ár var, at prøvtøkan fór fram á føroyskum í øllum lærugreinum við undantak av tí eini, og at tveir næmingar, sum sýttu fyri at tosa danskt undir prøvtøkuni eisini í hesi eini lærugreinini, ikki fingu prógv.

OG AFTUR Í ÁR hevur hart stríð tikið seg upp millum næmingar á Føroya Studentaskúla og myndugleikarnar. Nú eru tað 12 næmingar, sum ikki kunnu góðtaka, at uppgávurnar til skrivligu prøvtøkuna verða gjørdar á føroyskum, treytað av, at tær verða umsettar til danskt áðrenn tær verða dømdar.

PANELGREINIRNAR í tveimum teimum seinastu bløðunum hava viðgjørt hesar spurningar. Tann fyrra varð skrivað av læraranum Gunvør Hoydal og hin seinna av næminginum Sigmund Poulsen. Av hesum greinum framgekk, at hvørki lærarar ella næmingar eru nøgdir við viðurskiftini, soleiðis sum tey nú eru.

MÁLSPURNINGURIN er eitt, men eftir at hava lisið hesar greinir, megu vit koma til tað niðurstøðu, at innihaldið í teimum einstøku lærugreinunum er ein annar og ikki minni spurningur at fáa loyst. Tað framgekk av áðurnevndu greinum, at innihaldið í summum lærugreinum er danskt burtur av og lagað eftir donskum viðurskiftum í so stóran mun, at tað valla letur seg gera at tosa ella skriva føroyskt til prøvtøkuna í hesum lærugreinum.

TÁ MÁLSPURNINGURIN var frammi í fjør, viðgjørdu vit henda spurning og komu til tað niðurstøðu, at tað var sjálvsagt og náturligt at næmingarnir á Føroya Studentaskúla tosaðu føroyskt í øllum lærugreinum. Hetta halda vit framvegis, men spurningurin er bert, hvussu og hvussu skjótt hetta letur seg gera.

EFTIR PANELGREININI hjá Sigmund Poulsen at døma, letur hetta seg valla gera í løtuni, og ikki fyrr enn lærugreinirnar innihaldinum viðvíkjandi eru broyttar og lagaðar eftir føroyskum viðurskiftum.

EFTIR OKKARA tykki er tað, sum Sigmund Poulsen vísti á í panelgrein blaðsins seinasta leygardag, hin grundleggjandi skeivleikin, ið fyrst av øllum má rættast. Tá tað er gjørt, kunnu vit í fyrsta lagi tosa um skrivligar og munnligar prøvtøkur á føroyskum, tí gamalt er, at frá høvdinum skalt tú hvalin skera.

dagbókin

Gudstænasta

Sunnudagin hevur K.O. Viderø gudstænastu í Hvalba kl. 11 og í Sandvík kl. 18.

Fundur

verður í Missiónshúsinum við Landavegin í kvøld kl. 20.

Evangeliihúsið

Í kvøld kl. 21 útifundur í Vestmanna. Telefonandaktin svarar á tlf. 12266.

Brúdleyp

Friggjadagin 6. juni giftast í Roskilde Mildrið Lenvig, sjúkrasystir, Klaksvík, og Claus Ulsø, lækni, Virum. Adr.: Østergade 10 B, S.T.V. Roskilde.

Mikines-málningur á uppboði

Á uppboði í Kunsthallen í Keypmannahavn í seinastu viku varð ein málningur eftir S.J. Mikines, Bygd við havið, seldur fyri 13.500 kr.

V 4

Í V4-spæli útvarpsins seinasta leygarkvøld vórðu hesi tøl drigin: 16, 19, 20, 23, 31, 36, 43, 44, 58, 71, 82, 84, 91, 94, 66 og 99. Eingin vinnari var til tær 6.120 kr. Eykavinningurin uppá 1.000 kr. fór til Vestmanna.

Heldur tú ikki **BLAÐIÐ** sum umboðar landsins størsta flokk?

Undirritaði:

Navn: _____

Bústaður: _____

_____

tekni meg sum haldara av SOSIALINUM

Sendið hendan lepa í afturlatnum brævbjálva til:

sosialurin *box 76, 3800 Tórshavn,*

Skiparaskeið og kokkaskeið

byrja 5. august 1975 kl. 09.00.
Nærri við at venda sær til Klaksvíkar sjómansskúla.

Klaksvíkar Sjómansskúli
Telefon 5 6128
3870 Klaksvík

Hevur tú konto í
okkara banka

Tað eru umleið 26.000 ið hava konto.

Vøkstur bankans:

	balanca mill. kr.
1965	66
1970	142
1974	360

okkara banki
leggur til rættis og avgreiðir allar bankforrætningar bæði innan- og uttanlanda.

SJÓVINNUBANKIN
okkara banki